# Føroysk symfoni setti krøv til danskar tónleikar



*Sunnleif Rasmussen er errin av nýggju fløguni. Líkt er til, at hann ikki verður arbeiðsleysur sum tónasmiður í framtíðini, tí hann hevur longu fleiri bíleggingar til nýggj tónaverk*
Mynd Jens Kr. Vang

**Hóast tónleikarnir í danska symfoniorkestrinum eru vanir við eitt sindur av hvørjum, so setti symfoni'in "Oceanic Days" hjá Sunnleifi Rasmussen teimum serstøk krøv til upptøkuna. Hetta var samstundis fyrstu ferð at teir tóku upp eina fløgu í surround-ljóði**

FLØGUÚTGÁVA
*Snorri Brend, snorri@sosialurin.fo*

**Tónleikur:** Tað er ikki á hvørjum degi at út kemur ein føroysk symfoni. Og tað er heldur ikki á hvørjum degi, at ein føroysk fløga verður útgivin við surround-ljóði.

Tað var júst hetta sum hendi mikudagin, tá nýggjasta symfoni'in hjá Sunnleifi Rasmussen "Oceanic Days" varð útgivin á fløgu.

Eina slíka stórhending ynskti eingin at lata fara aftur við borðinum, og tí var Norðurlandahúsið karmur um løtuna, tá henda fløgan varð at hoyra á fyrsta sinni.

Til løtuna hevði Norðurlandahúsið sett upp eitt anlegg við surround-ljóði, soleiðis at fólk fingu høvi at hoyra, hvussu vindur og veður ferðaðust gjøgnum rúmið. Ein merkti nærum vindin blása í nakkan úr hátalarunum aftanfyri.

- Ætlanin var at geva fløguna út fyrri. Men vit hava bíðað eftir at útgerðin til upptøkuna av surround-ljóðinum varð sett upp í Danmarks Radio.

- Nú er so fløgan her, og eg haldi, at hon er framúr góð, segði Henrik Rørdam, sum er stjóri í Dacapo, ið hevur givið fløguna út.

Á fløguni er eisini ein konsert fyri saxofon, sum Sunnleif skrivaði fyri fýra árum síðani.

### Gott bland

Tað var ein ikki sørt errin Sunnleif Rasmussen sum henda dagin greiddi fólki frá arbeiðinum við fløguni.

Við nýggju útgerðini fekk hann eitt av stóru ynskjum sínum uppfylt, við møguleikanum at brúka alla upptøkuhøllina til tónleikin, og samstundis fáa hetta ynskið brent niður á eina fløgu.

Til verkið krevst nevniliga, at blásararnir standa í einum staði og sjálvt symfoni-orkestrið í einum øðrum staði. Á henda hátt fæst eisini eitt sera gott bland í ljóðið og veðrið, sum spælir so stóran leiklut í hesi fyrstu symfoni'ini hjá Sunnleifi.

- Eg eri tí sera væl nøgdur við úrslitið, segði Sunnleif, og takkaði samstundis øllum teimum 90 tónleikarunum sum í tveir dagar høvdu verið við til upptøkurnar av fløguni.

Hóast fløgan er upptikin í surround-ljóði, so kann hon eisini spælast í einum vanligum fløguspælara við góðum úrsliti.

### Finskur áhugi

Sunnleif hevur veruliga ment seg tey seinnu árini, og einki bendir á, at hann fer at hava nógva tíð til avlops í framtíðini.

Hann hevur longu nú fingið ein hóp av bíleggingum av ymiskum verkum, sum skulu framførast bæði heima og úti.

Henda fyrsta symfoni hansara kann ikki framførast á øllum støðum, tí at orkestrið stendur plaserað so víða. Av hesi orsøk eru heldur ikki allar konserthøllir, sum eru eins væl egnaðar til framførslu.

Líkt er kortini til, at finnar eiga slíkar høllir, og tí verður symfoni'in framførd í Helsingfors í heyst og næsta ár í einum øðrum finskum býi, sum kallast Tammerfors.

Hinvegin hevur hann longi fingið bíleggingar av symfoni nr. 2. Henda bíleggingin er komin úr einum øðrum finskum býi, sum kallast Turku, har Dómkirkjan verður karmur um framførsluna. Har er ætlanin at henda symfoni'in skal framførast á fyrsta sinni á heysti 2007.

Henda symfoni'in hevur vindin sum tema, og verður øðrvísi á mangar mátar enn ein vanlig symfoni, tí her verða eingir strúkarar við, - bara blásarar og ein urga.

Á skránni hjá Sunnleifi eru annars onnur umbiðin verk – m.a. ein kamaropera, sum skal framførast í Norðurlandahúsinum á vári næsta ár.

- So tit skilja, at eg verði ikki í ALS fyribils, segði Sunnleif skemtandi.

## Silvur til Føroya Bjór

**Tá Vestjysk Ølkultur herfyri hevði roynd-arsmakking av páskabryggi, gjørdist ølið hjá Føroyabjór nummar tvey**

ØLSMAKKING
*Jákup Mørk*

Føroya Bjór hevur í fleiri ár verið partur av ølsmakkingini hjá Vestjysk Ølkultur, og aftur í ár vóru teir millum tey átta sløgini, sum skuldu roynast.

Hesaferð gjørdist talan tó ikki um oddasess til Føroya Bjór, tí í hørðu kappingini máttu teir víkja fyri ølinum frá Vestfyn.

Góð skoðsmál fekk føroyska bryggjaríið kortini.

- Tað er fantastiska flott, at Føroya Bjór ferð eftir ferð endar í oddinum, tá vit hava okkara royndarsmakkingar, segði formaðurin fyri Vestjysk Ølkultur, Jan P. Larsen, eftir kvøldið.

Og eisini millum fjølmiðlarnar, vakti føroyska ølið ans. Soleiðis staðfesti ein blaðmaður eftirfylgjandi, at hann ikki visti av, at føroyingar dugdu at bryggja øl, yvirhøvur.

Nevnast kann, at bryggjaríini, Hancock og Thisted Bryghus, gjørdust ávíkavist nummar trý og fýra.

## Løgmaður á vitjan í Evropasamveldinum

LØGMANSVITJAN
*Tíðindaskriv*

Í døgunum 10. til 13. apríl verður løgmaður, Jóannes Eidesgaard, á vitjan í Evropasamveldinum. Endamálið við vitjanini er at hitta umboð fyri politiska kervið í ES á máli um áleikandi mál og at skifta orð um framtíðarviðurskifti millum ES og Føroyar.

Millum økini, ið løgmaður eftir ætlan fer at umrøða við ES-myndugleikar, eru vinnumál, útbúgving og gransking. Sendistova Føroya í Evropasamveldinum hevur í hesum sambandi fingið í lag fundir við ES-myndugleikar bæði mánadagin og týsdagin 11. og 12. apríl.

Vitjan løgmans í Evropasamveldinum endar við eini móttøku týskvøldið 12.apríl í Brússel.

Ein av okkara fremstu sangfuglum, Eivør Pálsdóttir, fer at framføra á móttøkuni, og útlendsku gestirnir fáa eisini høvi at royna forkunnugar føroyskir brellabitar. Føroysk listafólk fara eisini at sýna fram á móttøkuni.

## KT vinnan fær sín dag!

KT-DAGUR
*tíðindaskriv*

KT felagið skipar tann 6. mai fyri fyrsta KT degnum undir heitinum KT Dagurin 2005. Dagurin skal seta fokus á føroyska KT vinnu, og geva munandi vitan um nýtslu av KT loysnum til luttakararnar. Norðurlandahúsið verður karmur um Dagin.

Endamálið við Degnum skal m.a. náast gjøgnum 3 fyrilestrar á fakliga høgum støði har 1 føroyskur fyrilestrarhaldari og 2 útlendskir koma at geva degnum innihald. Evni á fyrilestrunum verður digitalisering, har m.a. digitalur signaturur verður umrøddur.

Ein dómsnevnd er sett, og hon fer at velja eina fyritøku/stovn á almennum ella privatum hondum, sum hevur hepnast serliga væl við innføring av einari væl skipaðari KT loysn. Vinnarin fær handað heiðursprógv og -lut fyri slóðbrótandi framtak í føroyskum høpi.

Øll kunnu tekna seg sum luttakarar á degnum á www.vrg.fo, og kostnaðurin er 520 kr.

Við í prísinum eru 3 fyrilestrar umframt ábit í steðginum.

Ætlanin er halda KT Dagin ólíka ár og KT Stevnuna líka ár soleiðis, at føroyska KT vinnan og almenningurin sum heild hvørt ár hava møguleika at nema sær vitan um, hvat rørir seg í KT heiminum.